# Summartónar í Hvalba

Í annaðkvøld klokkan 20 verður hugnakvøld í Roynhøllini í Hvalba har Aldubáran, Guðrun Sólja, Tróndur og Hjálmar fara at undirhalda. Harafturat verður góður matur at fáa frá bóltfelagnum Royn, sum skipar fyri hugnakvøldinum.



**Serblað um OYGGJALEIKIR**

**í blaðnum í morgin**

Sosialurin fylgir Oyggjaleikunum tætt. Tríggir mans hjá blaðnum eru staddir á Rhodos, haðani teir gera dagligar frásagnir



# The Carlsens á fløgu

**Vanja, Laila og Barbara liva til dagligt sum yrkissangarar í USA, har tær saman við The Revival Ministry ferðast kring landi og syngja. Tær eru vanlig sjón á fleiri heimsumfatandi sjónvarpsstøðum. Nú er fyrsta fløgan hjá teimum komin í handlarnar**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Nýggja fløgan hjá The Carlsens er komin í handlarnar*

Í hesi vikuni er fløgan ”The Carlsens” komin í handlarnar kring landið. Hetta er fyrsta fløgan, sum Carlsen systrarnar hava spælt inn saman undir egnum navni. Tær hava tó luttikið á fløgum so sum “Vit kunngera Jesus”, umframt at Vanja og Laila góvu LP’ir og bond út saman við mammu síni, tá tær vóru børn.

### Ferðast kring USA

Til dagligt ferðast tær tríggjar Vanja, Laila og Barbara kring USA saman við prædikumanninum Rodney Howard-Browne og hansara ferðandi kirkju The Revival Ministry. Tær eru uttan samanbering tað kristiliga føroyska tónleikanavnið, ið er komið longst í royndunum at gera vart við seg uttanfyri landoddarnar. Fløgan er tó upptikin í Føroyum í samstarvi við Kristoffur Mørkøre. Tær tríggjar vóru í upptøkuhølunum Krisstuff Studio í desember, beint áðrenn tær fóru til USA.

Við á fløguni spæla royndir føroyskir tónleikarar sum Kim Hansen og Gunnar G. Guttesen á klaver, James Olsen á trummum, Rúni Eysturlíð á gittar og so Kristoffur Mørkøre, ið spælir bass, gittar, forritar umframt at hava ljóðblandað fløguna saman við Bárði Háberg.

Fløgan varð givin út í USA í apríl, og sambært Vanju hevur móttøkan verið góð. Tær selja fløguna á ferðum sínum kring USA.

### Fjøllbroyttur tónleikur

Á fløguni eru fýra løg, eitt gamalt sálmalag, eitt lovsangslag frá Hillsongs, eitt gamalt gospellag og eitt gamal svenskt sálmalag. Vanja greiður frá:

- Stílurin er eitt sindur fjølbroyttur. Hetta er við vilja, tí hetta er fyrstu ferð vit tríggjar geva nakað út saman, og leita enn eitt sindur eftir hvønn stíl okkum dámar best. Tað fyrsta lagið á fløguni “He Leadeth Me” er eitt a capella lag. Hetta hava vit gjørt sera nógv av her yviri í USA, og hetta er avgjørt ta, sum fólk dáma best at hoyra okkum syngja. “Jesus Generation” er eitt sindur popput. Kristoffur Mørkøre hevur í samráð við okkum broytt stílin eitt sindur. Hetta lagið er kent frá fløguni ”Vit kunngera Jesus”. Vit hava altíð dámt hetta lag sera væl, men vildu ikki gera nakað, sum var gjørt fyrr, tí avgjørdu vit og Kristoffur Mørkøre at broyta arrangementið eitt sindur. “Put Your Hand” er eitt lag, sum vit hava hoyrt nógv í okkara uppvøkstri og hildu, at tað hevði verið stuttligt, at gjørt okkurt við tað. Tað endaði so við, at stílurin bleiv eitt sindur James Brown kendur. Vit hildu hetta vera sera stuttligt. Tað seinasta lagið; “Far Beyond Highest Heavens” er eisini eitt lag vit hava kent, síðan vit vóru smágentur. Pápi okkara dámar sera væl svenskan tónleik, og har hava vit so hoyrt hetta lagið spælt inn fleiri ferðir. Vit vildu eisini í hesum lagið arrangerað okkurt, sum vit ikki høvdu hoyrt fyrr, og Kristoffur kom fram við teimum tónleikaligu hugskotunum, og vit tríggjar stóðu fyri røddunum. Hetta er mest sum galdandi fyri alla fløguna.

### Opnar fyri Føroya vitjan

Carlsen systrarnar hava sáttmála við The Revival Ministriy í fyriblis eitt ár, hesin byrjaði í desember, og síðan tá hava tær verið fastur táttur á møtunum hjá kirkjuni. Hetta merkir, at tær javnan hava verið at sæð á kristnum sjónvarpsrásum sum GOD TV og CTN. Onkrar av hesum sjónvarpsrásum síggjast í Føroyum, og har ber til hjá føroyskum sjónvarpshyggjarum at uppliva tær væl syngjandi systrarnar live. Men nú er nakað fráliðið, síðan tær vóru á palli í Føroyum seinast. Vit spurdu Vanju, um ætlanir eru um framførslur í Føroyum í sambandi við útgávuna?

- Vit hava ikki fingið nakran fyrispurning um at koma heim at syngja enn, men eru sjálvandi opnar fyri øllum. Men fyribils er ongin ætlan um hetta, segði Vanja.

### Um fløguna

Heiti: The Carlsens

Løg:
He Leadeth Me (gamalt sálmalag)
Orð: Joseph Gilmore (1862)
Lag: William Bradbury (1864)

Jesus Generation (lovsongslag)
Orð og lag: Hillsongs

Put your hand (gamalt gospellag)
Orð og lag: Gene Maclellan

Far beyond highest heavens (Gamalt svenskt sálmalag)
Orð og lag Augusta Lönborg (1895)

# Bispaval útskrivað hálvan juli

**Danska kirkjumálaráðið fer væntandi at útskriva bispaval í Føroyum um góðar tvær vikur**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Um hálvan juli verður eisini ein dagur ásettur, nær síðsta freist at boða frá valevnum til biskupsvalið verður. Hetta veit Trúboðin at siga. Væntandi verður hendan freist einar tveir mánaðir seinni, tvs. umleið hálvan september. Fyri at stilla upp skal eitt valevni hava í minsta lagi 50 og í mesta lagi 150 stillarar. Bert kirkjuráðslimir og prestar kunnu velja bisp. Tað er danska kirkjumálaráðið, ið útskrivar valið, men av tí at Fólkakirkjan verður yvirtikin á ólavsøku skal Mentamálaráðið taka sær av gongdini eftir yvirtøkuna.

Hans J. Joensen, bispur, hevur boðað frá, at hann fer úr embætinum 30. november í ár.



### 1.300 ikki 300

Í frásøgn frá Jóansøkufestivalinum í Sosialinum mánadagin stóð, at John Lawton og Deiggj, fóru á pall framman fyri 300 áskoðarum. Almenna talið av áskoðarum hjá Jóansøkufestivalinum er 1.300 gestir. Vit biðja lesaran og fyriskiparar av Jóansøkufestivalinum halda okkum til góðar fyri villuna.

# Bankaeinskiljingin á P1

**Einskiljingin av Føroya banka verður eitt av evnunum í danska útvarpinum seinnapartin**

EINSKILJING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í hesum døgum vitjar danski búskaparserfrøðingurin, Morten Bennedsen, í Føroyum. Hann er professari á deildini fyri tjóðarbúskap á Copenhagen Business School.

Í dag fer hann at skipa fyri einum innslagi í sendingini »Orientering«, sum verður send á útvarpsrásini P1 hjá Danmarks Radio.

Morten Bennedsen ger greitt fyri Sosialinum, at hann í hesum sambandi ikki fer at virka í leiklutinum sum serfrøðingur, men sum journalistur. Hann sigur seg nevniliga hava fingið tey ráðini, at tað kann fatast sum »politisk spreingievni«, um hann sum dani fer at siga sína hugsan um politiskar spurningar í Føroyum, og tí verður bert talan um eina frásøgn frá støðuni í bankamálinum, ið Morten Bennedsen annars kallar eina »spennandi gongd«. Tí vil hann ikki avdúka, hvat hann sjálvur heldur um einskiljingina.

Sendingin verður at hoyra klokkan 16.10 føroyska tíð, men verður løgd á netið stutt eftir hetta.